# Kjak



**Axel Hansen**
*Fiskimaður*

## Armóð reiðarafelagsins

Vit hava í dag ein heimaflota sum er samansettur av ymiskum bólkum, t.d. trolarum, línubátum, garnabátum og øðrum. Hesin flotin er ein blanding av gomlum óhóskandi skipum, til góð nýtímans skip. Hesi skip hava flest øll maskinorku, sum er best egna til veiðuhátt teirra.

Manninganar á hesum skipum hava ymisk býtisprocent, alt eftir hvør veiðuhátturin er. Men nøkur ting eru felags: Landing, vørugjald, ísur, kassaleiða, sum fer av óbýttarið sølu, t.v.s. manninganar gjaldað av hesum. Harnæst kemur proviantur, sum bert er tað tú etur. Men orðið proviantur verður vanligt nýtt av reiðarum, sum sápa, wc pappír og útgerð til gallu ( køk), sum manningin eisini skal gjaldað fyri, hóast tað ikki er teirra skylda.

Tá eitt skip landar og endar túr, t.d. kl. 07.00 á morgnið og byrjar nýggjan túr kl. 20.00 á kvøldið, skal manningin gjaldað proviant tvær ferðir sama døgn. Hetta er galdandi fyri øll skip, sum fiska undir Føroyum. Hesi gera ímillum 20 – 40 túrar um árið. ( Manning x túrar = pening til reiðaran).

Fiskiloyvini sum vit kenna tey í dag, vóru útvega ókeypis frá landinum. Men sum flest okkara hava sæð, hava nakrir reiðarar nýtt hesi loyvir sum handilsvøru sínamillum, við vinningið ájavnt vápna og narkohandlið. Samstundis hava hesir somu klaga yvir, hvussu kostaðarmikið tað er, at dríva fiskivinnu undir Føroyum.

Síðani fiskidagaskipanin bleiv veruleikið og til í dag, hevur reiðarafelagið gramt seg um tær útreiðslur teir hava, men teir hava sjálvir skapt hesar, við sølu og keypi av fiskiloyvum og skipum, sum als ikki hava tað virði sum selt og keypt verður fyri. Hyggja vit eftir flotanum í dag, síggja vit at flestu skip skylda pening upp um skortsteinin. Grundin er ikki útreiðslur til nýtímans tøkni, men heldur spekulatión millum reiðarar-bankar og ikki minst politikkarar, sum ikki vilja tippa tey hol sum eru í lógum okkara.

Tað er í dag fleiri reiðarar, sum klára seg væl og hava ikki áhuga í verkbannið, bara fyri at forvinnað meira. Men hava eina vinnu sum er góð og effektiv og gevur til allar partar, men vit hava eisini aðrar, sum bert hugsa um seg sjálvar og vilja hava onnur at gjaldað.

Fleiri skip eru 20 – 40 ára gomul. Hesi hava fiska fyri hundratals milliónir hvørt. Nýtímans gerð av somu er minimal, men tey skylda næstan líka nógv nú, sum tá tey vóru keypt. Alt hevur ikki bert verði útreiðslur.

Hvar er peningurin nú, um hann ikki er í reiðaríinum? Tit hava ikki sett á stovn t.d. trygdargrunn – oljugrunn- hjálpargrunn, ella nakað, sum kann standa í móti við í verri tíðum, sum altíð koma og fara innan veiðuflotan.

Nú formaðurin í reiðarafelagnum gremur seg um oljuúreiðslurnar, kundi eg hugsa mær at vita, um tit veruliga gjalda dagsprísin, og ikki hava fingi ein vissan avsláttur frá oljufeløgunum. Grundin fyri hesum, er at eitt miðal skip (ein partrolari) brúkar ca. 200 ferðir meir í olju, enn eitt vanligt húsarhald hvørt ár.

Nei, tit í reiðarafelagnum. Gjaldið sjálvir tykkara útreiðslur. Kunnu tit ikki tað, so selji skip tykkara og lat onnur fáa fiskiloyvir tykkara. Hesi vóru útluta ókeypis, manningafeløgini skulu ikki gjalda fyri tykkara spekulatión og kleyvarskap.



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

## Vorið sum prógv

Í farnu viku, spurdi eg, í eini blaðgrein, Kristoffuri Gaardlykke, hvat hann grundaði sín pástand á, tá hann skrivaði, at Sambandsflokkurin í síni tíð hevði verið ímóti, at føroyingar fingu sítt egna flogfelag.

Kristoffur var skjótur at svara. Longu somu nátt skrivar hann á Vágaportalinum, at hann skal kanna málið.

Tað tykist mær løgið, at ein maður fyrst skrivar ein pástand í bløðini, og síðani lovar at kanna, um pástandurin er rættur. Hann skuldi sjálvandi heldur havt kannað málið fyrst, og so kanska skrivað um tað aftaná.

### Gevur sær sjálvur rætt

Eftir at hava kannað sín egna pástand í nakrar dagar, er Kristoffur endiliga komin til tað (ikki heilt óvæntaða) úrslit, at hann hevði rætt. Men nú hevur hann ikki bara funnið útav, at Sambandsflokkurin var ímóti, at føroyingar fingu sítt egna flogfelag. Nei nú hevur Fólkaflokkurin eisini verið ímóti.

Maðurin skrivar, at hann hevur hugt í Løgtingstíðini, eftir tingmáli nr. 20 í tingsetuni 1987. Har sigur hann seg hava sæð (í álitinum), at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin atkvøddu ikki fyri at stovna eitt føroyskt flogfelag.

### Fleiri feilir

Hetta má sigast at vera illa lisið. Fyri tað fyrsta, so verða álit altíð skrivað áðrenn atkvøðugreiðsluna, og tí kann tað av góðum grundum ikki standa í álitinum, hvussu flokkarnir atkvøddu.

Fyri tað næsta, so stendur ikki í Løgtingstíðindum, hvussu hvør einstakur tingmaður ella flokkur atkvøddi. Har stendur bara, at 20 atkvøður vóru fyri, og eingin var ímóti. Tá í tíðini var ikki vanligt at atkvøða ímóti einum máli, og tí sæst ikki út frá atkvøðutølunum, hvussu nógvir tinglimir vóru á fundi, tá atkvøðugreiðslan fór fram. Men onkrar av hasum 20 atkvøðunum mugu so í hvussu so er vera komnar frá Sambandsflokkinum ella Fólkaflokkinum, tí teir áttu 7 tinglimir í part, og trekkja vit tvær ferðir 7 frá 32, so koma vit niður um 20, so hatta "prógvið" sær út til at detta sundur í límingini.

### Semja var um flúgvingina

Tað sum Løgtingstíðindi siga um tingmál nr. 20/1987 er, at skiftandi landsstýri høvdu í mong ár arbeitt við spurninginum um føroyska luttøku í millumlanda flúgving. Ein trupulleiki hevði verið, at tað var kostnaðarmikið at koma í gongd, og harafturat manglaðu útbúgvin fólk á øllum økjum. Tí hevði landsstýrið gjørt avtalu við eitt danskt flogfelag (Cimber Air) um í felag at stovna eitt partafelag, har føroyingar skuldu eiga 51%, og eisini skuldi Cimber hjálpa til við at útbúgva fólk.

Kristoffur sigur, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin vildu hava eina loysn saman við Danair/ Mærsk Air um eitt danskt-føroyskt flogfelag, meðan aðrir flokkar vildu hava eitt føroyskt flogfelag. Tað stendur ikki í Løgtingstíðindum. Har stendur, at allir flokkar høvdu ynski um, at føroyingar skuldu uppí flúgvingina, men ósemja var um, hvørt tað var rætt at binda seg til Cimber Air, áðrenn aðrir møguleikar vóru kannaðir út í æsir. Eingin tosaði um eitt 100% føroyskt flogfelag. Minnilutin fanst at manglandi kunning um tann fíggjarliga partin og tað løgfrøðisliga í sambandi við samstarvsavtaluna. Hildið varð eisini, at nakrir praktiskir spurningar í sambandi við flúgving og viðlíkahald ikki vóru nóg greidliga lýstir. Tað er ikki tað sama sum at vera ímóti, at føroyingar komu uppí flúgvingina.

### Endi

Tað gevur onga meining at brúka ov nógva tíð til at kjakast um hetta, men eg helt kortini, at tað gjørdi einki um fólk, ið koma við ymiskum leysum pástandum, onkuntíð sleppa at prógva tað, tey siga – ella, sum í hesum førinum – sleppa at visa, at tey hava eingi prógv.



**Knút Dalsgaard**

## Hvar ætlar tú tær?

Eg havi eina neyð fyri menniskjum, sum ikki kenna Jesus, og sum ikki hava givið sítt lív til Hann.

Tú kemur at lesa nakrar setningar, sum ikki eru so deiligir at lesa, teir virka møguliga áloypandi fyri teg. Men eg havi upplivað so nógv saman við Jesusi, at eg eri sannførdur um, at Hann er Tann, Hann sigur Seg vera, og eg eri eitt livandi vitni uppá, at Jesus livir enn í dag. Alt sum eg úttali meg um í hesum skrivi er av kærleika.

Tú sum lesur hettar, tú skalt vita tað, at tú ikki ert miseydnaður, tú ert ikki ein feilur ella ein tilvild. Møguliga tú ikki hevur havt tað gott, ella hevur tað ikki gott. Møguliga tú hevur havt ein keðiligan uppvøkstur, ella møguliga hevur tað verið onkur hending, sum hevur verið í tínum lívið, sum hevur sára teg. Møguliga feilar tær onki, tú er glaður og takksamur fyri tað lívið tú livir. Men líkamikið hvør tú ert, hvat tú gert og hevur gjørt, hvat tú hevur veri ígjøgnum ella uppliva, so skalt tú vita tað, at tú ikki er ein tilvild. Menniskir hava møguliga skuffað teg, men eg kenni Ein, sum kennir teg betur enn nakar, Hann kennir teg betur enn tú kennir teg sjálvan. Hann hevur myndað teg, áðrenn tú varð í móðurlívi, Hann hevur umsorgan fyri tínum minstu trupulleikum, Hann hevur eina heilt ávísa ætlan við tínum lívið, Hann hevur eitt fantastist lív at bjóða tær, menniskju kunnu svíkja teg, men Hann svíkur teg aldrin, Hann gav Sítt egna lív fyri teg, og Hann eitur Jesus.

Um tú ongantíð hevur givið títt lív til Jesus, so hevur tú møguleikan nú at taka avgerðina. Jesus doyði og reis upp fyri teg, nú er tað bert upp til tín, tú hevur frían vilja. Eitt skalt tú vita, at Jesus kemur aftur ein dag, og vit vita ikki nær, Hann kann koma aftur í dag, líka so væl sum um 200 ár ella 2000 ár. Hann kemur aftur, tá Hann ætlar Sær at koma aftur, tá kemur Hann eftir teimum, ið hava givið sítt lív til Hann, og tekur tey heim til Sín. Tú ert ikki harri yvir degnum í morgin, ei heldur næsta hálva tímanum. Tað er møguligt, at deyðin tekur teg í dag, tú hevur ein kropp, sum kann gera enda á tínum lívi nær sum helst, tú kann blíva yvirkoyrdur ella okkurt heilt annað. Tak tí røttu avgerðina nú. Játta teg sum ein syndara, sum hevur svikið Gud, bið Hann um fyrigeving, og bjóða Honum vælkomnan í títt lív, og gev títt lív til Hann.

Vit hava við eitt ævigt lív at gera. Hevur tú ikki tikið ímóti Jesusi og givið teg heilt og fult til Hann, áðrenn tú doyr ella verður tikin, so er Helviti heimstaður tín, og tað er í allar ævir. Loyv ikki Satan at trýsta ein múr upp millum teg og Jesus, ver tú sigrandi og brót stoltleikan, ger ímóti tínum vilja, eg eri sannførdur um, at tú fer ikki at angra tað. Hettar er sannleiki sum eg havi skrivað, tú broytir ikki sannleikan við at ikki trúgva honum! Eg skal enda við einum spurningi til tín: Hvar ætlar tú tær? Til himmals ella helviti?